Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Nr. 79/2019

Fyrispurningur eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um rávørugóðsku, settur landstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a).

1. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvussu góðskan er á fiski, sum kemur um føroyskan kaikant, samanborið við grannalond okkara t.d. Ísland?
2. Hvat heldur landsstýrismaðurin skal til fyri at betra um rávørugóðskuna?
3. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta átøk í verk, sum eggja fiskiskipum at gera styttri túrar og útróðrarbátum at blóðga fiskin og brúka ís/ísvatn, og soleiðis koma til lands við feskari fiski?
4. Eru ætlanir at gera skipanir, sum gera tað lættari at skilja útróðarafiskin?

Viðmerkingar:
Í Dimmalætting 28. februar staðfestir stjórin á Nevinum í Runavík, at vit í Føroyum eru á einum nógv lægri støði enn til dømis Ísland, tá tað kemur til góðsku á landaðum fiski. Hann vísir á, at í Íslandi hevur fleiri dagar gamal fiskur einki virði, og at hetta hevur við sær, at bæði íslendsk og føroysk skip, sum landa í Íslandi, ikki koma inn við fiski, sum er eldri enn fimm dagar. Fiskurin, sum fer um føroyskan kaikant, er ofta nógv eldri, tí at føroysku fiskiskipini gera longri túrar, tá teir landa í Føroyum. Umframt longu túrarnar vísir stjórin á Nevinum eisini á, at tað er stórur munur ímillum ymisku skipini/bátarnar alt eftir, um veiddi fiskurin er væl ella illa hagreiddur. Harafturat stúrir hann fyri, at føroyskir ráfiskakeyparar ikki fáa atgongd til ráfiskin. Í hesum sambandi vísir hann á, at tað støðugt verður torførari hjá óheftum virkjum, sum ikki eiga skip, at fáa hendur á rávøruni. Og hann ger somuleiðis vart við, at tað, at tað verður tosað um at lata upp fyri landingum uttanlands, er ein hóttan móti føroysku framleiðslufyritøkunum. Spyrjarin heldur, at tað er neyðugt at fáa hesi viðurskifti útgreinað nærri, og at fáa innlit í, hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur hesum viðvíkjandi. Eisini ynskir spyrjarin at fáa útgreinað nærri, hvat landstýrismaðurin ætlar at gera við hagreiðingina av útróðarfiski.

Tann 5. mars 2020 setti spyrjarin ein grein 52a spurning til Jacob Vestergaard, landsstýrismann í fiskivinnumálum (nr. 63/2019). Tann 17. mars 2020 svaraði landsstýrismaðurin soleiðis til omanfyri settu spurningar:
"Spurningarnir 1-3 snúgva seg um góðsku á fiski. Viðurskifti viðvíkjandi góðsku á fiski eru fevnd av matvørulóggávuni (løgtingslóg nr. 58 frá 26. mai 2010 um matvørur v.m.) og kunngerð nr. 161 frá 18. desember 1995 um heilsufrøðiligan rakstur, viðgerð av fiski og fiskaúrdrátti og løggilding av fiskiførum.
Nevnda lóg og kunngerð eru undir málsræði hjá landsstýrismanninum í umhvørvis-og vinnumálum. Spurningar um góðsku á fiski eiga tí at verða settir landsstýrismanninum í umhvørvis-og vinnumálum."

Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 6. mai 2020

Jóhannis Joensen